Stjórnarblaðið í essinum:

Fiskifrøðingar forpesta arbeiði hjá fiskimonnum og flakakonum!


DAGBLAÐIÐ

NR. 21 - 58. ÁRG. MÁNADAGUR 20. FEBRUAR 1989 6 KRÓNUR

Til Tunis á páskum? So ring tlf. 13966

Lærdómur lættur at bera:

40 fiski-frøðingar aftrat

Vøruvogns-koyring v/ Svend Christiansen Tlf. 13659

Valfelag Fólka-floksins í Vágum

Fiskifrøðingar fáa sína almennu løn útgoldna í eina tíð eftir, at teir hava verið við til at koyra fiskivinnuna á heysin. Í hesi tíð ballast teir í reisigildi á nýggju rannsóknarstovuni, haðani teir frameftir fara at jagstra tey niðurpindu lasaførini eftir sigla.

Tað er málgagn Fólkafloksins, stjórnarblað Føroya, sum kemur við hesum grovu skuldsetingunum á forsíðuni mánadagin.

Greinin er eitt so grovt álop á tey fólk, sum starvast í hesum og øðrum virkjum, ið hava tilknýti til fiskivinnuna, at hon — nú Fólkaflokkurin situr við valdinum — kann ikki standa ósvarað.

Ikki bert verandi og pensioneraðir fiskifrøðingar fáa frammaná, men eisini øll tey ungu, sum eru farin til útlondini at útbúgva seg innan fiskivinnuna, verða tveitt á lortadungan — øll niðurgjørd og hunddálkað av fólkafloksmálgagninum.

Sosialurin hevur vent sær til stjóran á Fiskirannsóknarstovuni fyri at fáa eina viðmerking til hesa grein. Hann hevur ymiskt uppá hjarta, tó at hann ikki ynskir at fara í blaðkjak við stavnamann Fólkafloksins.

jan

Hjalti í Jákupsstovu vísir aftur skuldsetingum:

— Vit koyra ongan á heysin men vísa á at flotin er alt ov stórur!

— Handan greinin er av slíkum slag, at ein kann ikki svara henni. Tað loysir seg heldur ikki at svara slíkum, ti tað eru færri og færri fólk, sum trúgva tí, ið stendur í Dagblaðnum.

Hetta sigur stjórin á Fiskirannsóknarstovuni, Hjalti í Jákupsstovu, í eini viðmerking til sera grovu skuldsetingarnar, sum verða settar fram móti fiskifrøðingum í Føroyum, Fiskirannsóknarstovuni og annars øllum teimum ungu, sum nema sær fiskivinnuútbúgving í útlandinum, í Dagblaðnum mánadagin.

Blaðið skrivar, at fiskifrøðingar forpesta arbeiði hjá fiskimonnum og flakafólki og eru annars við at koyra fiskivinnuna á heysin.

Hjalti í Jákupsstovu uggar seg tó við, at innanfyri Fólkaflokkin eru tað eisini fólk, sum halda, at fiskifrøðingar og starvsfólkini á Fiskirannsóknarstovuni gera eitt nøkulunda arbeiði og at tað er tørvur á einum stovni sum Fiskirannsóknarstovuni.

Burturvið

— Hevur tú nakrantíð áður verið fyri so grovum skuldsetingum sum hesum nú?

— Eg ætli mær ikki í blaðtjak við hatta blaðið, tí har er jú einki høpi í tí, sum skrivað verður. Sagt verður, at 45 føroyingar útbúgva seg til fiskifrøðingar. Hetta er heilt burturvið. Tey fólkini, sum útbúgva seg innan fiskivinnu í løtuni, nema sær útbúgving frá tí at arbeiða á flakavirkjum til fiskifrøðing. Tað mátti tá verið gott at vitað sær, at tað eru fólk í hesum landi, sum hava hug at útbúgva seg innan okkara høvuðsvinnu eins væl á landi sum sjógvi og harvið gera sitt til at menna hesa vinnu, sigur Hjalti í Jákupsstovu.



Fiskifrøðingar og havfrøðingar á almennum kjakfundi í Norðurlandahúsinum nøkur ár herfyri. Nú fáa teir allir lortaspannuna frá fólkafloksmálgagninum niður yvir seg, ti teir ditta sær at hava eina meining og annars at úttala seg um arbeiðsøki sitt

Og hann heldur fram: — Og mær vitandi er tað bert ein føroyingur sum lesur til fiskifrøðing í dag og ikki 45, sum Dagblaðið skrivar. So tað hevur als einki við veruleikan at gera at skriva at tað koma at arbeiða 45 fiskifrøðingar her á stovninum í framtíðini.

Annars meini eg, at vit á Fiskirannsóknarstovuni gera eitt rimuliga gott arbeiði og at vit hvørki frá verandi ella undanfarnum landsstýrum hava fingið stórar ábreiðslur.

Misskiljing

Tað er ein total misskiljing, um onkur heldur at arbeiði okkara er at friða og forða. Okkara uppgáva er fyrst og fremst at ráða til ein fiskiskap, sum vit í longdini fáa mest burtur úr, soleiðis at menn kunnu fiska og ikki fara á heysin. Tað, sum er við at henda í løtuni, er, at menn, sum eiga skip, fara á heysin við verandi fiskiskapi.

Uppá fyrispurning um ein orsøkin til hetta ikki er

»